# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit fara ikki niður við høvdinum, og nú er bara at fáa eitt gott úrslit ímóti B68
Pætur Dam Jacobsen, Skála*

# Aftur tann besti

**Annað árið á rað varð Cristiano Ronaldo kosin sum ársins spælari av við- og mótspælarum í ensku Premier League**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Annað árið á rað er Cristiano Ronaldo kosin besti spælarin í Onglandi. Og tað eru væl tey fægstu, sum eru ósamd í hesum*
*Mynd: Polfoto/AP*

Hann hevur verið flúgvandi í ár. Hóast útgangsstøðið er á veinginum, so hevur Cristiano Ronaldo higar til í ár funnið veg til meskarnar ikki færri enn 38 ferðir.

Og tað var nóg mikið til at halda Fernando Torres, Steven Gerrard, Cesc Fabregas, Emmanuel Adebayor og David James aftan fyri seg í atkvøðugreiðsluni.

Talan er um triðja árið á rað, at Ronaldo verður heiðraður av spælarunum í Premier League. Í 2007 varð hann kosin besti ungi spælari, og heiðurin sum ársins spælari fekk hann altso bæði í ár og í fjør.

Manchester United er í løtuni í ferð við at fyrireika seg til seinnu hálvfinaluna móti Barcelona, sum verður spæld í morgin, og tí fekk hann ikki verið til hátíðarløtuna. Men umvegis stórskíggja tók hann móti stóra steypinum, sum hann segði seg vera sera errin av.

- Tá tú arbeiðir hart alt kappingarárið fyri at spæla væl og gera nakað gott fyri liðið, og tú við ársenda fært slíkan heiður, fært tú illa verið annað enn nøgdur. Og ein slíkur heiður ber við sær, at tú bara leggur enn meira fyri í framtíðin, segði Ronaldo.

Ronaldo kom til Manchester United sum heimsins dýrasti teenager í 2003. Og hann heldur, at hann hevur betrað seg nógv síðani skiftið, sum kostaði Manchester United £ 12,24 milliónir. Umframt heiðurin sum ársins spælari í Onglandi í fjør, varð hann tá eisini kosin triði besti spælarin í heiminum.

Heiðurin, sum besti ungi spælarin fór í ár til Cesc Fabregas. Hann vann atkvøðugreiðsluna framman fyri júst Ronaldo.

# Chelsea átti ongan

**Tað kann væl vera, at Chelsea kann vinna bæði Premier og Champions League. Men hvørki í kappingini um at gerast ársins spælari ella á ársins liði átti Chelsea nakran spælara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir 2-1 sigurin á Manchester United leygardagin hevur Chelsea skapt spenning til tað seinasta um enska meistaraheitið.

Men hóast liðið ikki hevur tapt nakran dyst í Premier League í ár, so tykist hetta ikki hava fingið aðrar spælarar í Premier League upp frá í gleði.

Soleiðis var eingin spælari hjá Chelsea millum teirra, sum vóru nomineraðir til ársins spælara, og heldur ikki á ársins liði átti Chelsea nakað umboð.

Her var tað Arsenal, sum var best umboðað við fýra spælarum, og teimum á baki kom Manchester United við trimum spælarum. Liverpool hevði tveir spælarar á liðnum, og seinastu plássini fóru Portsmouth og Aston Villa.

Ársins lið í Premier League 2007/2008 sær soleiðis út: David James (Portsmouth), Bacary Sagna (Arsenal), Rio Ferdinand (Man Utd), Nemanja Vidic (Man Utd), Gael Clichy (Arsenal), Steven Gerrard (Liverpool), Cesc Fabregas (Arsenal), Cristiano Ronaldo (Man Utd), Ashley Young (Aston Villa), Emmanuel Adebayor (Arsenal), Fernando Torres (Liverpool).

